Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Vælveru-klænking í Havn

Tað ljóðar kanska ov gott til at verða satt. Tað ljóðar kanska eitt sindur ótrúligt, og tað ljóðar í øllum førum eitt sindur yvirdrivið. Men tað satt! Tú kanst missa yvir 15 centimetrar av kroppinum eftir eina viðgerð! Sosialurin hevur roynt tær víðagitnu Slankiwraps.



Á Facebook hevur ein sæð nógv til lýsingar og myndir av fólki, sum hava roynt tað sokallaða Slankiwrap, sum er ein nýggj viðgerð í Føroyum. Í lýsingunum verður lovað, at øll missa í øllum førum 15 centimetrar av kroppinum, og um ikki, so er viðgerðin ókeypis. Men hvussu ber tað til ?

Sosialurin hevur verið til Slankiwraps, LIFT6 andlitsviðgerð og og LPG-Lipomassagu.

## Lipomassagan

Eftir arbeiðstíð eitt fríggjakvøld fór eg til vælverustovuna hjá Ergo í Havn, har hesar víðagitnu viðgerðirnar skuldu roynast. Eftir eina langa og strævna arbeiðsviku, er tað altíð deiligt, at sleppa til vælveruviðgerð, og soleiðis varð eisini hetta kvøldið. Men eg var kortini nakað skeptisk um hesar 15 centimetrarnar, sum Ergo lovar fara av. Væl vitandi, at eg kanska ikki teljist millum tær størstu kvinnurnar, so loyvdi eg mær at ivast í, um 15 centimetrar yvirhøvur kundi fara av mær.

Fyrst á skránni var lipomassagan, sum hevði til endamáls at uppstramma, lyfta og forma kroppin. Eg legði meg niður, ílatin eina svarta nylon-líknandi drakt, og so fór viðgerðin í gongd. Tað minnist mest um eitt súgvukopp, sum verður settur á kroppin. Trupulleikin við hesum er, at eg fekk rættiliga ilt av viðgerðini. Eg skilti á kvinnuni, sum framdi viðgerðina, at tað er rættiliga vanligt, at fólk fáa ilt av viðgerðini, men tað er ymisk hvussu ilt fólk fáa.

Um tú fegin vil hava eina avslappandi massagu, so er hetta helst ikki rætta viðgerðin. Men hevur tú hinvegin appilsin húð, ójavna húð ella líknandi, so er hendan viðgerðin ein góð hjálp, um enn hon ikki tekur alt burtur.

